HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

9. desember 2025
Mál: 25/20844-38
Tygara Skriv: LM-057/2025
Viðgjørt: Selma Davidsen

LM-057/2025 : Uppskot til løgtingslóg um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum

Landsstýriskvinnan í heilsumálum var á fundi við Løgtingsins fíggjarnevnd fríggjadagin 5. desember 2025. Landssjúkrahúsið og Landsverk luttóku eisini á fundinum. Fíggjarnevndin bað um at fáa tíðarætlan fyri H-bygningin sendandi, og eina lýsing av gongdini við H-bygninginum. Serliga við atliti til tær broytingar, ið eru gjørdar.

Tíðarætlanin, sum biðin varð um er hjáløgd, bæði sum gantt skjal (Fylgiskjal 1) og í skjali nevnt "Umvælingartíðarskeiðini fyri H-bygningin" (Fylgiskjal 2). Fíggjarprofilurin, sum er í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður eisini hjálagdur í størri stødd (fylgiskjal 3).


Fíggjarnevndin bað serliga um at fáa lýst, hvørjar broytingar hava verið í verkætlanini.

Løgtingslóg nr. 129 frá 22. desember 2008 (... LM:47/2016, LM:44/2019) um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, við seinni broytingum. (Fer úr gildi 1. januar 2027)
Henda fyrsta verklagslógin snúði seg um, frá byrjan av, eins og heiti á henni er, um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið. B-bygningurin var umvældur, eins og svimjihylurin, røntgan, vaskaríið og annað viðlíkahald varð framt á Landssjúkrahúsinum.

Henda høvuðslóg fevndi frá byrjan av um alt Landssjúkrahúsið. Og tí eisini um byrjanina av at byggja nýggja H-bygningin. Eftir at farið var at prosjektera bygningin varð avgjørt at gera parkeringskjallara undir bygninginum, heldur enn at fylla upp við gróti. Játtan til útgerð innbúgv og list kom við í 2013. Eisini varð avgjørt, at H-bygningurin skuldi hava Há-isolatiónsstovur. Hesar vóru ikki í upprunaligu byggiskránni. Í 2020 kom prosjektering av DAS (nýggj kallskipan fyri alt sjúkrahúsøkið), samdøgurðsrútmuljós, ljóðbrúsarar til psykiatrisku seingjastovurnar, skinnarar í loft í medisinskum seingjastovum, ávaringarskipanin varð víðkað, umframt at hondvøsk komu í seingjastovurnar og seingjaportalarnir vóru tillagaðir.

Lagt var eisini upp fyri longdari byggitíð og prísvøkstri.

Løgtingslóg nr. 64 frá 5. mai 2021 (LM: 112/2020) um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð. (Fór úr gildi 31. desember 2024)
Verkætlanin við H-bygninginum hevði eitt greitt arbeiðstøkumark, ið var útsíðan á B-bygninginum. B-bygningurin hevur 9 hæddir, har samanbinding er gjørd við H-bygningin í trimum av hæddunum. Tað er í kjallarahædd, í móttøkuhædd og á aðru hædd. Verkætlanin at binda H- og B-bygningarnar saman snúði seg sostatt í mestan mun um broytingar niðast í B-bygninginum (sum er eirgrønur á liti).



Greitt var millum annað soleiðis frá um umbyggingina í B-bygninginum. Brotið niðanfyri er leysliga tikið úr lógaruppskotinum.

B0
Í kjallarahæddini í B-bygninginum, B0, er talan um serliga umfatandi umbygging.

Einasta og skynsamasta leiðin at koma til H-bygningin frá B-bygninginum er gjøgnum økið, har tað nú millum annað er skiftirúm hjá starvsfólkum, hjárúm til kapellið, goymsla og seingjareiðing (seingjavask). Hesi mugu flytast og verða m.a. nýggj skiftirúm staðsett í H2 og í B0, har seingjareiðing er í dag.

Í hesi umbygging verða atlit t.d. tikin til, at rýmingarleiðin frá øllum 9 hæddunum kemur niður nærindis í hesum økinum, eins og til, at høvuðstalvurúmið til el er har. Eisini er sektiónsstovan (líkskoðan) í hesum økinum.

B0 tekniskar leiðingar
Umfatandi umleggingar skulu gerast á el- og rørskipanir, soleiðis at H-bygningurin verður skynsamt knýttur at teknisku skipanunum í B-bygninginum og restini av sjúkrahúsøkinum.

Har skulu veggir, el og rørskipanir til vatn, kloakk, spillvatn, ventilatión o.l. beinast burtur, og nýggj útgerð setast upp.

Skipanirnar til medisinska luft skulu nú eisini fevna um H-bygningin, eins og vakumskipanin til súgv í øllum seingjastovunum í B-bygninginum og H-bygninginum skal tað. Útgerðin skal endurnýggjast, m.a. tí verandi kompressarar eru ov smáir.

B1
Í móttøkuhæddini í B-bygninginum, B1, skulu gólv og veggir gerast á umleið 130 m^2. Eisini skal brunaskilnaður gerast millum H-bygningin og B-bygningin.

B2
Á aðru hædd í B-bygninginum, B2, skulu gólv og veggir gerast á umleið 130 m^2. Fyri at fáa fulla breidd á gongina millum bygningarnar verður ein partur av einum læknakonferansuhøli tikin niður. Eisini skal brunaskilnaður gerast millum H-bygningin og B-bygningin.

Kostnaðurin at binda H-bygningin og B-bygningin saman er 42,8 mió. kr. Harumframt kom tann seinni neyðgeneratorurin inn í verkætlanina, sum skal tryggja, at allar kritiskar funktiónir í H-bygninginum virka, hóast streymslit er. Harumframt vóru øll gott 500 rúmini gjøgnumgingin og ætlanin fyri tól og útgerð varð dagførd.

Løgtingslóg nr. 82 frá 16. mai 2022 (LM-138/2021) um at innrætta víðkaða partin av kjallaranum í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum til parkering, goymslu og reingerð, umframt til goymslutorn og vegleiðing í H-bygninginum. (Fer úr gildi 1. januar 2027)
Frammanundan hesi verklagslóg vóru góðir 2.000 m² útgrivnir, og sprongt var eisini, so kjallaran var í røttu hædd, veggir og súlur vóru stoyptar upp, og betongdekk lagt omaná sum loft í kjallaranum. Harumframt vóru rørleiðingar o.l. lagdar, og var kjallarin grovplaneraður.

Tann víðkaði parturin av kjallaranum skal nýtast til parkeringskjallara og goymslu. Goymslan virkar eisini sum felags innkeypssentur fyri fleiri stovnar hjá landinum og kommunum. Afturat hesum kom reingerðarmiðstøð á hesa hæddina við starvsfólkahøli og goymslu til reingerðarvørur o.a. Neyðugt varð harumframt at gera broyting við goymslutorninum og var tá greitt soleiðis frá: “Neyðugt er at dagføra goymsluskipanina í goymslutorninum fyri at halda sterilar vørur og ikki sterilar vørur frá hvørjum øðrum. Hetta merkir, at verandi hillaskipan verður tikin niður, og at tvær nýggjar hillaskipanir verða settar upp inni í goymslutorninum, og skaktin verður tillagað til nútíðar krøv til reinførið til sterilar vørur”.

Skelting og vegleiðing kom við í ætlanini fyri at leiðbeina fólki á rætt stað. Talan var t.d. um móttøkuskermar, talgild hurðaskelti, skeltingar á glasveggir og markeringar til sjónveik og blind.

Løgtingslóg nr. 134 frá 8. desember 2023 um at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan. (Fer úr gildi 1. januar 2027)
Talan er um bygningsarbeiðir, byggiplássrakstur og longda byggitíð, umframt isolatiónsstovur. Bygningsarbeiðini, ið talan var um, vóru ikki lýst í nøgdarlistum áður, umframt at tað í fleiri førum var talan um dagføring og betranir av verandi veitingum. Farið var frá ætlanini at byggja Há-isolatiónsstovur, tí komið var fram til, at tað var skynsamari at gera isolatiónsstovur heldur enn háisolatiónsstovur. Krøvini til háisolatiónsstovur vóru eisini broytt munandi frá 2017.

LM-057/2025 : Uppskot til løgtingslóg um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum
Uppskotið, sum nú er í viðgerð vísir á at neyðugt er at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum og at fyrireika gerðarrættarmál. Vavið av lekum er stórt. Neyðugt er at umvæla ella skifta vindeygu, skifta úthurðar umframt annað arbeiði fyri, at bygningurin gerst tættur, og verður egnaður til endamálið. Harumframt er talan um nakrar avleiddar skaðar, ið eisini skulu umvælast.

Landsgrannskoðanin, frágreiðing:
Á fundinum við Fíggjarnevnd løgtingsins var umrøtt, at gongdin er lýst í frágreiðing frá Landsgrannskoðanini, sum løgtingsgrannskoðararnir bóðu um í 2023.[1]

Landsgrannskoðanin lýsir kostnaðargongdina soleiðis:
Í 2011 roknaði Heilsumálaráðið við at brúka 295 mió.kr. til H-bygningin, umframt pening til innbúgv, útgerð og list.

Í 2013 komu 54,5 mió.kr. afturat, t.v.s. at kostnaðurin var tá mettur til 349,5 mió.kr.

Í 2017, tá ið tilboðini um at byggja bygningin vóru fingin, var kostnaðurin 295 mió.kr. + 40,5 mió.kr. = 335,5 mió.kr. Afturat tí komu útgerð, innbúgv og list fyri 58,1 mió.kr. og prísvøkstur 91,6 mió.kr., tað gevur 485,2 mió.kr.

Í 2017 játtaði Løgtingið 18 mió.kr. til parkeringskjallara (sum ikki var við upprunaliga), soleiðis at H-bygningurin nú kom at kosta 503,2 mió.kr.

Í 2019 kom fram, at fíggjarstýringin var ófullfíggjað, og at roknskapurin ikki var eftirfarandi. Tá vísti tað seg, at 101,2 mió.kr. manglaðu, fyri at bygningurin kundi byggjast liðugur. Harumframt var brúk fyri 26,8 mió.kr. til nýggja útgerð og tøkni, umframt 9 mió.kr. til annað. Við hesum var kostnaðurin av H-bygninginum komin upp á 619,2 mió.kr.

Í 2021 bað landsstýrismaðurin um fleiri pengar til útreiðslur, sum byggiharrin hevði vitan um, máttu til fyri at bygningurin kundi virka, og at treytin um eina inngongd til alt

[1] Landsgrannskoðanin: Frágreiðing um nýtsluna til byggiverkætlanina "Landssjúkrahúsið, útbygging"

Landssjúkrahúsið kundi lúkast. Tá máttu 42,8 mió.kr. játtast til at binda bygningarnar saman, 3 mió.kr. til neyðgenerator, og aftur 25 mió.kr. til tól og útgerð, tilsamans 70,8 mió.kr. Kostnaðurin var nú komin upp á 690 mió.kr.

Í 2022 bað landsstýrismaðurin um pening til at innrætta kjallaran og til goymslutorn og vegleiðing, tilsamans 67 mió.kr. Nú var kostnaðurin av útbygging av Landssjúkrahúsinum komin upp á 757 mió.kr.

Almanna- og heilsumálaráðið kann síðani greiða frá:
Í 2023 bað landsstýriskvinnan um pening til at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan, tilsamans 43,7 mió.kr. Meirútreiðslurnar standast av hægri útreiðslum til bygningsarbeiðir, byggiplássrakstur og longda byggitíð, umframt isolatiónsstovur. Tá var kostnaðurin av útbygging av Landssjúkrahúsinum komin upp á 800,7 mió.kr.

Nú í 2025 biður landsstýriskvinnan um pening til at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum, tilsaman 33,8 mió. kr. Tað er til at bøta og umvæla lekarnar á klimaskerminum og umvæla fylgiskaðar. (vindeygu og hurðar, umframt gerðarrættarmál). Nú er kostnaðurin av útbygging av Landssjúkrahúsinum komin upp á 834,5 mió.kr.

Allar upphæddir, ið eru játtaðar til Landssjúkrahúsið, útbygging eru ikki fevndar av verklagslóg. Hetta játtanaryvirlit niðanfyri fevnir um tær játtanir, ið eru knýttar at teimum verklagslógum, sum innganga í tað yvirlit, ið er í hesum lógaruppskotinum. Samlaða upphæddin er tí hægri enn upphæddin í kostnaðargongdini, sum er lýst omanfyri.

Játtanaryvirlit (mió.kr)	Verklagslóg (2019)	2020	2021	2022	2024	2025 - uppskot
Løgtingsmál	LM 47/2016	LM 044/2019	LM 112/2020	LM 138/2021	LM 010/2023	LM 57/2025
B-bygningurin, samlað	**103,4**	**4,3**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**
B-bygningurin	60,5					
Svimjihylurin	1,2					
Røntgen	20,7	3,7				
Vaskaríið	21,0	0,6				
Ymiskt viðlíkahald	**46,0**	**1,3**				
H-bygningurin, samlað	**503,2**	**128,0**	**28,0**	**0,0**	**43,7**	**32,8**
H-bygningurin	503,2	101,2	25,0		43,7	32,8
Nýggj tøkni og útgerð		26,8	3,0			
DAS, samdøgursrútmuljós v.m.		9,0				
Prosjekt. B-bygningurin		4,3				
Prosjekt. Samanbygging		0,0	42,8			
Way-finding				3,9		
VPK (víðkaði partur av kj.)				63,1		
Gerðarættarmál						1,0
Játtan til samans	**652,6**	**146,9**	**70,8**	**67,0**	**43,7**	**33,8**

Um Løgtingsins fíggjarnevnd hevur aðrir spurningar, ber til at venda sær til Almanna- og heilsumálaráðið.

Vinaliga

Almanna- og heilsumálaráðið